Kamarkonsert í Klaksvík

Klaksvíkar musikskúli skipar fyri kamarkonsert, har spæld verða verk av Mozart, Haydn og Fauré. - Kór og solosangur verður eisini á skránni

Býráðshøllin í Klaksvík verður aftur komandi leygardag karmur um kamarkonsert við fjølbroyttum tilfari.

Tey luttakandi verða Alex Solstein og Monica Stauss Joensen violin, Helga Hilmarsdóttir Gerðalíð floytu og klaver, Derek Jones og Bogi Lützen klaver og Jens Chr. Guttesen cello.

Umframt hesi, verður solosangur, sum Edvard Ziska stendur fyri við Derek Jones sum undirleikara.

Eisini luttaka »17 sangarar« við nøkrum fáum sangum, onkrum jóla- og heystsangi.

Umframt at Musikskúlin bjóðar øllum til hesa konsertina, metir skúlin tað sum ein umráðandi tátt, at foreldur til tey børn, ið ganga á Klaksvíkar Musikskúla koma til eina slíka konsert, bæði av teirri orsøk, at tey sjálvi koma at uppliva nakað, og tað skorðar eisini undir áhugan hjá børnunum.

Musikskúlanæmingar sleppa inn fyri 10 krónur. Annars er kostnaðurin 30 krónur.

Konsertin er kl. 16.00 í Býráðshøllini.

Gamlamannadansur í KÍ-høllini við Country-bólkinum

Leygarkvøldið 23. november verður ein tann størsti gamlamannadansur, ið nakrantíð hevur verið í Klaksvíkar Ítróttarhøll. Hugnaligt umhvørvi við ljóð- og ljósútgerð við bestu góðsku, garderobu og cafe, fer at skapa tær neyðugu rammurnar, ið eiga at verða til slíkan rímmar dans

Country-bólkurin

Tað er neyvan nakar annar bólkur í tónleikarliku søgu norðoyinga, sum hevur nátt tindunum eftir so stuttan tíð sum Country-bólkurin. Fáir mánaðir eru farnir, síðan teir av fyrstantíð trinu fram á pall og vístu síni kynstur í einfaldan, lættan og undirhaldandi country- og dansitónleik - og tað er júst hetta slag av tónleiki, sum tilkomin fólk vilja hava eitt gott leygarkvøld undir lonini í Klaksvíkar Ítróttarhøll. Teir, ið mynda bólkin eru Olgar Petersen, sang og guitar, Noel Joensen sang og bass, Johannes Poulsen tangentar, Adolf Jacobsen guitar, Absalon Østerø guitar og Sonhard Johannesen trummur.

Hugnaligt umhvørvi

Ongantíð áður hevur høllin verið so vakurt skrýdd, sum hon verður hetta leygarkvøldið. Lívandi ljós, dúkar á borðinum, garderoba og cafe, samstundis sum høllin verður skrýdd við pyntiballónum og øðrum skrýðislutum. Hetta við góðum countrytónleiki fer ivaleyst at skapa hugna og veitslulag hettar kvøld.

Gott ljóð

Fyri at alt skal verða á høgum støði, verður ljóð- og ljósútgerð leigað frá serkønum á økinum. Talan er um somu ljóðútgerð, sum var í høllini, tá ið KÍ skipaði fyri Medaljudansi í oktober. Hetta er ein tann besta ljóðútgerð í Føroyum.

Bussamband til Viðareiðis

Í sambandi við dansin verður skipað fyri bussambandi til Viðareiðis og hinar bygdirnar norðanfyri tunnlarnar. Bussur fer av Viðareiði kl. 24.00 og steðgar á í Hvannasundi, Norðdepli og Árnafirði. Eftir dansin kl. 03.30 fer bussurin norður aftur.

Veðurtænastan á Veðurstøðini
Upplýsingar um veðrið á veðurstøðunum kunnu fáast við at ringja á tlf. 12210.

Norska blaðið „Stavanger Aftenblad“:

Atlantsmótið mest lovandi økið fyri oljuleiting í heiminum

Havleiðirnar á Atlantsmótinum eitt nú millum Føroyar og Hetland verða mettar sum tær mest lovandi fyri oljuleiting í øllum heiminum.

Stóra ferðalagið hjá Saga, her saman við Paula Einarson, formanni í Føroya Oljuiðnað og havnameistaranum í Havn, á havnaøkinum á Sundi. Mynd kalmar

JAN MÜLLER

Hetta skrivar norska blaðið „Stavanger Aftenblad“ 2. november í ár í sambandi við, at norska oljufelagið Saga Petroleum nú tekur seg heilt út úr Indonesia, har tað hevur brúkt nærum eina hálva milliard kr. til oljuleiting seinastu árini og ístaðin hevur norska oljufelagið gjørt av at brúka pengar og orku uppá leiting á Atlantsmótinum eitt nú við Føroyar.

-Vit hava mett um rammutreytirnar, har eisini skatt, í øllum nýggjum leitiøkjum og hava funnið fram til, at Noreg er besta økið at arbeiða í, sigur Arne Halvorsen, informationsleiðari hjá Saga. Her er so ikki minst talan um nýggju økini á djúpum vatni út fyri Miðnoreg.

Hann sigur við norska blaðið, at Saga vónar eisini at sleppa at luttaka í nýggju økjunum vestan fyri Hetland.

Og tað er í hesum sambandi, at oljuleitingin við Føroyar kemur inn í myndina. Alt økið - frá Vøring bassenginum út fyri Miðnoreg, til Føroyar og Hetland og víðari til umráðini vestan fyri Írland - verður mett sum nakað av tí mest áhugaverda í oljuleitingini í heiminum í dag.

Vil keypa Santa Fe

Blaðið skrivar, at Saga hevur gjørt fleiri royndir at vera í leitingini á bretska landgrunninum, og áhugin var sjálvandi styrktur eftir, á felagið í 15 útbjóðingarumfarinum, gjørdist operatørur fyri "Gjallaryggen", sum er ein av blokkunum í Vøring bassenginum. Hetta er úti á djúpum vatni og sum jarðfrøðiliga minnir ikki sørt um leiðirnar við Føroyar.

Tá felagið somuleiðis er við at bjóða umleið sjey milliardir krónur fyri oljufyritøkuna Santa Fe, verður tað gjørt fyri at kunna siggja alla Vesturhellingina (Atlanterhavsskråningen) undir einum. Santa Fe hevur nevniliga fleiri av lisensunum, sum Saga manglar í pørtum av hesum nýggja økinum, skrivar Stavanger Aftenblad.

Herfyri kunngjørdi Saga, at tað ætlaði sær ikki at vera við ella leggja so nógv í oljuleitingina á donskum øki í Norðsjónum, men at felagið heldur vildi brúka sína orku á Atlantsmótinum.

Hetta sæst so eisini av tí itøkiliga áhuganum, sum Saga hevur fyri føroyska økinum. Saga var við í Lopransboringini. Herfyri segði Asbjørn Larsen, sum er ovasti stjóri í fyritøkuni á eini samkomu í høvuðsborgini hjá Saga fyri m.a. føroyskum gestum, at Saga nú av álvara fór at leggja orku sína í leitingina við m.a. Føroyar.

Júst í hesum døgum eru fleiri mans frá Saga á kunningarferð í Føroyum. Her er serstakliga talan um fólk frá Florøbasanum, sum er ein útgerðarstøð hjá oljufeløgunum.

Sagafólkini hava vitjað kring landið, eitt nú í Vágum, Suðuroynni, Klaksvík, Skálafjørðinum á í Suðurstreymi. Tey halda í dag tíðindafund um vitjanina.

Seinnapartin í gjár skuldu Saga fólkini hitta løgmann, sum umsitur oljumál í Tinganesi.

Skrivstovuhøli í Klaksvík
ynskjast til leigu

Heimarøktin í Norðoyggjum søkir eftir hóskandi hølum til leigu.

Skrivligt tilboð um prís og upplýsingar um støðd ynskist.

Møgulig tilboð verða at senda til.

HEIMARØKTIN
Bøgøta 1 - 700 Klaksvík